# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FÁIÐ KAPPING Á EL-ØKIÐ

Sjálvandi skulu vit føroyingar hava ein el-veitara, sum í størst møguligan mun kann veita borgarum og fyritøkum her á landi neyðugu tænastuna og trygdina. Og sjálvandi eigur málið hjá sama el-veitara at vera, at orkan í alsamt størri mun skal vera grøn. Men tað eiga eisini at vera aðrir hættir at røkka hesum málum, enn einvíst at hækka prísirnar, soleiðis at stóra maskinaríið hjá SEV kann mala runt.

Formaðurin fyri stýrið segði herfyri í miðlunum, at einasti møguleikin, sum SEV hevði, um fíggjarstøðan skuldi haldast forsvarlig, var at hækka prísirnar, og bara tann útsøgnin í sjálvum sær sigur meira enn gott er um ein tungan almennan stovn, sum ongantíð hevur verið partur av nakrari trimming yvirhøvur.

Privata vinnan kennir tað á kroppinum, hvørja ferð ein ferðil av kreppu er í landinum. Fólk verða uppsøgd, og skerjingar verða gjørdar har, sum tær á nakran hátt kunnu gerast, soleiðis at útreiðslurnar verða hildnar niðan fyri inntøkurnar. Tað sama er hent hjá teimum almennu fyritøkum, sum eru privatiseraðar seinnu árini. Eitt nú hava Posta og Føroya Tele bæði verið ígjøgnum fleiri spariumfør seinnu árini. Og hóast tað ikki er nøkur hugalig staðfesting, so hava hesi spariumfør verið neyðug fyri at skilbøta raksturin.

Men hjá almenna mastodontinum, sum heldur til við Landavegin í Havn, tykjast orð sum rationaliseringar, skerjingar og sparingar ikki at vera serliga væl lýdd. Neyvan er tað so, at allar hugsandi sparingar longu eru framdar, og at stovnurin tí er so effektivur, sum hann á nakran hátt kann verða. Men kortini hava vit ongantíð hoyrt um sparingar hjá SEV. Tvørtur ímóti eru føtur settar í spenni, tá onnur vilja sleppa á kervið hjá SEV at framleiða – enntá framleiða bíligari enn SEV.

Sum skilst ætlar leiðslan í SEV á aðalfundinum í morgin, at fundurin skal samtykkja sama uppskot, sum fall á seinasta aðalfundi. Tað er ikki



nóg gott, um leiðslan als ikki kemur við nøkrum spariætlanum, so sum hon varð biðin um á aðalfundinum í november, tá uppskotið um prís-hækkingina varð strikað.

Okkara ráð til kommunurnar, sum eiga SEV, eru tí, at stovnurin fyrst av øllum eigur at rationalisera raksturin. Gev samstundis stovninum ta kapping, sum er neyðug fyri at tryggja effektivitet og framburð.

Tá høvdu vit uttan iva fingið ein stovn, sum gjørdist munandi bíligari í rakstri. Ja, kanska somikið, at endaprísurin mótvegis brúkaranum varð lækkaður heldur enn hækkaður.

**»» Almenni mastodonturin SEV eigur eisini at spara**

---

## Fíggjarmálaráðið átti at gingið undan við sparingum

Fíggjarmálaráðið vil ikki hava sitandi á sær, at ráðið oyðslar við pengum og keypir eina úthurð fyri eina slaka millión, so sum Sosialurin skrivaði fríggjadagin. Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóri sigur, at tað er ikki beint, at úthurðin kostar so nógv. Hon kostar bara ein triðing ella ein fjórðing av hasi upphæddini.

– Inngongdin í Fíggjarmálaráðnum er gjørd til ein náttklubba í áttatiárunum, og er als ikki hóskandi. Har gýsur so illa, at fólk fáa ikki arbeitt, sigur hann.

Eisini vísir hann á, at størsti parturin av pengunum skal brúkast til nýggju móttøkuna, sum er í inngongdini til Fíggjarmálaráðið.

Longri viðmerking frá Fíggjarmálaráðnum er at lesa á síðu 13.

---

Men »so far so good«.

Tí tað sum kortini ørkymlar er, at embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum og fíggjarmálaráðharrin sjálvur kunnu finna upp á at koma við slíkum ynski í tingið, samstundis sum sami fíggjarmálaráðharri setir samgongu og landsstýri upp eftir enda fyri at finna pengar til lønarhækkingina hjá almennt løntum. Stríðið fríggjadagin snúði seg um seks milliónir krónur.



*Nýggja hurðin í Fíggjarmálaráðnum, soleiðis sum arkitekturin hevur teknað hana*

Nú sigur aðalstjórin, at vanligt er við umjáttanum, tá árið er farið at halla. Men halló…

Vit kunnu eisini hyggja í rúgvuna av spariuppskotum frá landsstýrium í ár – taka eitt tilvildarligt mál:

Tann 29. september kemur uppskot í tingið frá Rósu Samuelsen um at strika viðbót, sum verður latin fyritíðarpensjónistum, sum búgva á stovni, ið er góðkendur sambært lóg um almenna forsorg.

Hetta var eitt beinleiðis spariuppskot, sum sparir landskassanum 720.000 krónur um árið.

Vit kundu nevnt fleiri dømi.

Tí er tað ikki í ordan, at tað skal vera so lætt hjá einum aðalráð at brúka eina millión bara soleiðis í eini handavend - sum kanska kann bíða eftir betri tíðum, eftirsum hon hevur bíðað alla ta tíð, Fíggjarmálaráðið hevur húsast í glasborginini á Argjum.

– Og fyri tað, um Fíggjarmálaráðið hevur spart nakrar pengar, so merkir tað ikki, at teir endiliga skulu brúkast, tað áttu fólkini í Fíggjarmálaráðnum at vitað best…

---



**»» Ein miseydnað privatisering**

JØRN ASTRUP HANSEN
KJAK Á SÍÐU 14



**»» Offur fyri valdsmisnýtslu**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 16

---

## Steinur oman á byrðu hjá vinnuni

Vinnan er ikki fegin um, at SEV ætlar at hækka el-prísin munandi. Vinnuhúsið skrivar, at ætlaðu hækkingarnar av el-prísinum eru steinur oman á byrðu hjá vinnuni, sum hevur ógvuliga trupult við at fáa endarnar at røkka saman. Tað er ikki bara vanligi borgarin, men eisini vinnulívið, sum kemur at líða undir ætlaðu hækkingunum av el-prísinum.

Seinastu tíðina eru fleiri lógaruppskot løgd í tingið, har økt verður um kostnaðarstøðið hjá vinnulívinum. Hækkingin av barsilsgjaldinum, tilfeingisskattur og oljuavgjald hava verið ávegis seinastu tíðina og sannlíkt er, at fleiri av hesum lógaruppskotum verða samtykt av løgtinginum fyri jól.

SEV hevur fyri kortum fráboðað hækking av elprísinum komandi ár við 15 oyrum, umframt at útlit eru fyri, at el-prísurin fram til 2013 fer at hækka 15 oyrum um árið. Hetta er steinur oman á byrðu hjá vinnulívinum, sum hevur sera torført við at fáa endarnar at røkka saman. Í heilum fræ簡ttist um húsagangir og uppsøgn av starvsfólki í fyritøkum, og hetta sýnist ikki at ávirka tey, sum taka avgerðir í politisku skipanini hjá landi og kommunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag óttast gongdina, og Jóhan Páll Joensen formaður í felagnum sigur við heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, »at tað er sera ørkymlandi, at atlit ikki verða tikin til vinnulívið í hesum tíðum, nú tørvur er á, at fjálgað verður um tað vinnulív, sum er, og ikki øvugt«.

Avleiðingin av kostnaðarhækkinginum verður serliga stór í útjaðaranum, sum í frammanundan hevur avbjóðingar við skuldartungum kommunum, fráflyting og høgum arbeiðsloysi.

– Føroya Arbeiðsgevarafelag heitir tí á SEV, kommunu- og landspolitikarar um at umhugsa ætlanirnar um hækking av gjøldum og prísum, og heldur at leggja seg eftir at betra um karmarnar fyri føroyskum vinnulívið, skrivar Vinnuhúsið.

Sosialurin Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo